# Tendra jólatræ í Havn



JÓL
*Tíðindaskriv*

Í dag, leygardagin kl 15:30, verður jólatræið á Vaglinum í Havn tendrað. Havnar Hornorkestur fer at spæla, og Heri Joensen, prestur, og Jan Christiansen, býráðsformaður, fara at tala.

Síðani fara Ung Stjørnuskot at syngja á Glade Hjørn.

Jólatrøini á Argjum, Hvítanesi, Norðradali og í Kollafirði verða tendrað næsta vikuskifti.

J. Bronckgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo
VETRARTILBOÐ
1 vika í Danland
1 vika í Danland-íbúð í Blokhus, Hirtshals ella Ebeltoft
Tilboðið er galdandi frá 18.9. - 2003 til 27.3. - 2004
ferð við uppihaldi fyri 2 vaksin og 2 børn við bili fram og aftur
úr 5.995,-
1 vika á Pers Hotel
Frítíðardepilin Pers Hotel í Gol í 1 viku
ferð við uppihaldi fyri 2 vaksin og 2 børn við bili fram og aftur
5.000,-
Easterhoull Chalets
1 vika í summarhúsi í Easterhoull í Hetlandi
ferð við uppihaldi fyri 2 vaksin og 2 børn við bili fram og aftur
4.500,-
2 FYRI 1
Ferðist 2 og gjaldið fyri 1 fram og aftur í innv. 2-koyggjukamari við wc/bað íroknað bil:
Til Danmarkar: 2.990,-
Til Noregs: 2.380,-
Til Hetlands: 1.790,-
Hetland-Cruise við hotelli
Hósdag - Mánadag: 1.500,-
Mánadag - hósdag: 1.000,-
Mini-Cruise úr 600,-
Til Danmarkar ella Noregs
SMYRIL LINE

JEEP GRAND CHEROKEE
· myrkabláur
· árg. 96
· automatisk gear
· km. 72.000
Motorur : Bensin · 5.200 cm³ · V8 · 215 hk
øll sýn og eftirlit hjá Chrysler.
Leðursetur aftan og framman, klimakontrol, el-setur framman v/programmering, el rútar aftan og framman, el. spegl, el. sóltak úr glasi, hiti í setrum framman, 17'' sportfelgur við breiðum profildekkum umframt org. felgur við heilársdekkum.
Til sølu fyri hóskandi boð omanfyri kr. 150.000,-
Jógvan Nielsen
225498/314849
Sosialurin 341800

Jólahugni
Leygardagin 5. desember 2003 í Losjuni
Oddmar á Steig hugleiðir um jólini
Við klaverljómi frá Jóan Petur Jacobsen syngja vit kendu jólaløgini.
Losjan í Havn
Sosialurin 341800



Búskaparráðið skrálar:

# Haldið fingrarnar burtur

**Vøksturin er steðgaður, og einasta grund til panikk er, um tað almenna fer niður í landskassan og stuðlar vinnuni. Hetta er ein av niðurstøðunum hjá Búskaparráðnum, sum fríggjadagin kom við síni frágreiðing fyri 2003.**

BÚSKAPARFRÁGREIÐING
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

Øll tekin eru í Føroyska samfelagnum um, at nú gongur verri. Arbeiðsloysi er kvinkað uppeftir. Útflutningurin veksur ikki longur. Og tað almenna lúrir við sparingum og umhugsar studning til útvaldar vinnur.

Búsakaparráðið kunngjørdi fríggjadagin sína frágreiðing um støðuna í Føroyum. Og í niðurstøðunum verður staðfest, at tað gongur afturá, men samstundis verður hvassliga ávarða móti at blanda seg upp í vinnulívi.'

– Í tíðum við afturstigi tekur spurningurin seg ofta upp, um tað almenna fyri at halda upp á arbeiðspláss skal lata kapitalstudningar til vinnutólini í einstøkum vinnugreinum í trupulleikum. Hesuferð hevur serliga verið talan um rækjuflotan og alivinnuna Í ár hava røddir verið frammi um verju av rávørutilgongdini til fiskavirkini og studning til flutning av fiski, vísir frágreiðingin á og skrálar í høvdið á politikarunum, um at halda fingrarnar burtur frá vinnulívinum.

## Latið falla sum ikki kann standa

– Greiða svarið er, at eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi má undir ongum umstøðum haldast uppi við at seta konkursreglurnar í útflutningsvinnunum úr gildi við studningi av ymsum slag. Reglan, um at fyritøkur, sum yvir longri tíðarskeið ikki forrenta sína nýtslu av framleiðslumiðlum, mugu fara á húsagang, er týdningarmesta spælireglan í einum marknaðarbúskapi og skal vera strangt umsitin.

– Her skal leggjast áherðsla á vandamiklu avleiðingarnar av bæði kapitalog rakstrarstudningum og av øðrum verjutiltøkum. Orsøkin til at eingin fyritøku- ella vinnugreinaspesifikkur studningur skal latast er, at annars broytist atferðin hjá vinnulívinum soleiðis, at virksemið lagar seg ikki til broytt marknaðarlig viðurskifti.

## Marknaðurin er Guð

Føroyar eru við í einum marknaðarbúskapi og skulu klára seg har. Og tað uttan mun til, hvørja kapping vit kunnu vænta okkum. Fara kinverjar at framleiða bíligt flak, so mugu førloyingar gera okkurt annað ella selja fiskin óvirkaðan av landinum.



*Herman Oskarsson, formaður í Búskaparráðnum*

Høvuðsávarðingin er, at tey, sum hava við fisk at gera, skulu lurta eftir kiloprísinum, sum keyparin bjóðar og skulu ikki lurta eftri politiskum nevndum. Og skulu so undir ongum umstøðum bíða eftir eini fíggjarligar innspræning úr landskassanum.

– Vit gera okkum sjálvum ein beina við at lata útflutningsprísirnar óskerdar raka framleiðaran, tí tað er styttsta leiðin til neyðugu tillagingina av framleiðslugongdini. Styttstu leiðina til vinnuliga broyting fáa vit við at lata framleiðaran av vøruni merkja prístekini so skjótt og ótarnað, sum til ber, verður sagt í frágreiðingini.

– Um tað verður við feskum fiskavørum – viðgjørdum ella óviðgjørdum – at vit best kunnu kappast á marknaðinum, so slepst ikki undan, at vit fara at flyta fiskin so feskan sum til ber á marknaðin, antin sum lidnar døgverðarættir ella sum ráfisk til útlendsk virki. Tað er betri at hetta hendir skjótt og ótarnað heldur enn við einum longum millumbili við lágum inntøkum og burturoyðsli av almennum pengum.

– Um vit í framtíðini fara at framleiða fryst flak á flakatrolarum undir Føroyum, flyta feskan fisk ella fesk fløk við flogfari í meginlandið ella framleiða lidnar døgverðarættir við framkomnari tøkni, er ikki til politiskar nevndir ella í virkanarbólkar (lobbyir) hjá vinnubólkum og fakfeløgum at avgera. Tað eigur harafturímóti at vera ótarnaða kappingin um rentabilitet, sum avger hendan spurningin.

## Fiskiloyvi og aliloyvi skulu keypast

Meiri kapping skal inn í bæði fiskivinnuna og alivinnuna.

– Løgin um vinnuligan fiskiskap, sonevnda "Fiskidagaskipanin", peikar fram móti árinum 2004, tá gyldisskeiðið til upprunaligu loyvini, sum vóru givin í 1994, endar. Hetta høvi eigur at verða brúkt til at endurnýggja lógina, so fiskidagaskipanin gerst ein marknaðarlig skipan, har marknaðarprísur verður latin fyri fiskidagarnar. Tá fáast fyritreytirnar upp á pláss fyri munadyggari effektivisering av fiskiskapinum. Tá skipini gjalda fyri rættin at fiska, og rásurnar gerast rúmari og fríari í skipanini, verða tað tey mest effektivu førini og best riknu fyritøkurnar, sum fáa høvi at sleppa framat.

Og um alivinnuna verður skrivað:

– Viðvíkjandi alivinnuni eiga karmarnir um vinnuna at umskipast soleiðis, at allar forðingar fyri útlendskum kapitali verða avtiknar. Eru myndugleikarnir bangnir fyri, at útlendskar fyritøkur keypa føroyskar alifyritøkur av "strategiskum" orsøkum (eitt nú fyri at niðurleggja virksemi), ber til forða fyri hesum á annan hátt. At steingja fyri útlendskum íløgum í føroyska alivinnu er í øllum førum ein vánalig loysn.

– Eisini eigur tað almenna, sum eigari av firðunum at uppkrevja leigu fyri aliloyvi. Um landið regluliga uppkravdi leigu svarandi til tilfeingisrentuna, heldur enn at lata aliloyvini fyri einki, hevði eitt aliloyvi ikki verið ein gáva til útvaldar persónar. Haraftrat hevði spurningurin, um fíggingarstovnar skulu fáa loyvi at taka veð í aliloyvinum, tá verið týdningarleysur í politiskum høpi, og heldur verið ein spurningur um, hvat er mest praktiskt fyri raksturin av vinnuni.



*Hvørki alivinnan ella rækjuvinnan eigur at vera stuðlað við almennum pengum. Framleiðararnir í Føroyum skulu vera teir fyrstu at merkja, tá søluprísurin lækkar, sigur Búskaparráðið millum annað í síni frágreiðing*

## Skal ikki ræðast útreiðslur

Landskassin skal ikki halda seg vera eina fyritøku, sum skal hjúkla um sínar pengar í landsbankanum. Fíggjarpolitikkurin í landinum skal ikki verða stýrdur av um fíggjarlógin gevur hall ella avlop.

Búskaparráðið heldur, at framgongd kann koma við at tað almenna stimbrar heimamarknaðin, men tað skal ikki gerast við studningi. Búskarráðið mælir ikki beinleiðis til, at landsstýrið fer inn og stimbrar búskapin, men heldur ikki at nøkur serliga grund til at ræðast.

– At stara seg blindan upp á gjaldsjavnan og úrslitið í fíggjarløgini er annars vanligt millum bæði politikarar og fólk flest. Millum onnur hevur samgongan hevur sett sær sum mál, at fíggjarløgtingslógin skal geva avlop í hvørjum ári – og helst vaksandi avlop. Eisini úr Løgtingsins fíggjarnevnd hevur ljóðað, at hon fer ikki at bera eitt fíggjarlógaruppskot, sum gevur hall, niðan í Tingið.

– Hetta sáðar iva um sparitiltøkini hjá Landsstýrinum veruliga eru ætlað sum liður í einari strategiskari politiskari kós um minni almenna nýtslu og um at fíggja tað almenna við føroyskum skattum eina. Heldur bendir hetta á ein illa grundaðan fíggjarpolitiskan ótta fyri úrslitinum í fíggjarlógini.

– Landsstýrið eigur at vera til reiðar at hava hall á fíggjarlógini í sama mun, sum tað er til reiðar at hava avlop. Skulu konjunkturafturstig ikki raka meinari enn neyðugt er, eigur tað almenna í minsta lagi at halda eina støðuga kós í útreiðslupolitikkinum, uttan mun til um hall av og á er í landskassaroknskapinum.